Barnagarðurin á Konmansmýru

# Pedagogur

**Vit søkja eftir 1 Pedagogi**
Søkt verður eftir einum pedagogi 35 tímar um vikuna, at byrja skjótastgjørligt ella eftir nærri avtalu.

Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-5 ár.
Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**

- **Trivnaðin**
- **Opinleika**
- **Samarbeiði**

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Er røkin, nærlagdur og álítandi.
- Nýhugsandi og ígongdsetandi.
- At tú heldur tað verða spennandi og mennandi.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevara–felagið Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen.
TLF. 317878

Umsókn við avriti av prógvið og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 16. august 2006
**Barnagarðurin á Konmansmýru**

**Barnagarðurin á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO-100 Tórshavn

# Porkeris skúli

Søkt verður eftir einum lærara frá 14.september 2006 til 30. juni 2007 vegna lærara í barnsburðarfarloyvi. Starvið er fulla tíð, 26 tímar um vikuna.

Umsøkjarin skal m.a. kunna átaka sær undirvísing í:
- Føroyskum 1.-7. flokk.
- Enskum 4.-7. flokk.
- Kristni 1.-7. flokk.
- Søgu 4.-7. flokk
- Ítrótti 1.-3. flokk

Søkt verður eisini eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2006/2007, vegna avlopstímar, uml. 7 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

Umsøkjarin skal m.a. kunna átaka sær undirvísing í:
- Donskum 3. flokk
- Handaligum lærugreinum 3.-7. flokk

**Tann, ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarar skúlans undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vera við til at menna skúlan

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum Mannbjørn Olsen, Hólavegur 15, Porkeri, í hendi í seinasta lagi ónsdagin 9. august 2006 kl. 12.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran Mannbjørn Olsen tlf. 373864, fartlf. 262864.

Porkeris skúli hevur komandi skúlaár 29 næmingar. Skúlin er tveyflokkaður við næmingum í 1.-7.flokk. Í skúlanum fara at starvast 4 lærarar.

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*STUÐULSSKIPANIN FYRI VAKSIN OG DEILDIN FYRI SINNISVEIK*

# Stuðul til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Stuðulsskipanin fyri vaksin søkir eftir einum stuðli til brúkara í Vágum. Tann, ið settur verður, fer í samarbeiði við aðrar stuðlar at arbeiða í skiftandi vaktum. Starvið er normerað til 27 tímar um vikuna at byrja skjótast gjørligt.

Førleikakrøv:

Stuðulsskipanin ynskir ein stuðul við viðkomandi útbúgving m.a. heilsuatstøðing, pedagog, ergoterapeut ella ein við líknandi útbúgving. Um eingin umsøkjari er við útbúgving, kann starvið verða sett við øðrum umsøkjara.

**Vit vænta at tú:**
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans
- Er tolin og hevur eina positiva menniskjafatan
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið onki kann sigast um frammanundan

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um starv innan Heimarøktina og Serforsorgina. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primert ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Einu Andreasen ella Odu Jóhansdóttir á tlf. 354020.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu innan 21.08.06 sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Oda Jóhansdóttir
Løkjatúni 1
FO-160 Argjum

# Frá Føroya Psoriasisfelag

Skipað verður fyri viðgerðartúri til Naftalan í Kroatien.

Naftalen er eitt sjúkrahús, ið hevur eina avdeiling sum er fyri fólk við Psoriasis og Psoriasis Artritic.

Farið verður úr Føroyum tann 31. august, og komið verður aftur tann 28. september.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, kunnu fara til egnan kommunulækna, sum sendur umsókn til húðalæknan. Umsóknin skal vera húðalæknanum í hendi seinast tann 14. august.

Eru ivaspurningar hesum viðvíkjandi, kann ringjast á tlf. 424179

**Vinarliga**
**Føroya Psoriasisfelag**




**LOYSNIN!**

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

Nýtt múraravirki

**Vit átaka okkum alt múraraarbeiði...**

sp/f MÚRARAVIRKIÐ
RDC
tel 59 20 30